bólkur 1:

# NSÍ sigraði fyri fyrstu ferð

**KÍ hevur á heimavølli ikki megnað at vunnið ímóti kappingarneytunum í bestu deildini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Leygardagin eydnaðist tað NSÍ á Valloyruni í Sandavági í triðju royndini í kappingini um Løgmanssteypið at fáa fulla úrtøku. NSÍ, sum fyrst tapti á heimavølli ímóti B36 og síðani megnaði javnleik í Klaksvík, vann 3–1, og sigurin var rudduligur. At kappingarneytarnir báðir, B36 og KÍ, fingu eitt stig í part í Klaksvík, hevur við sær, at NSÍ styrkti væl um sína støðu.

NSÍ var á odda 3–0, áðrenn Birgir Joensen fram ímóti dystarenda við hegnisligari skotroynd pyntaði um fyri heimaliðið.

Sjúrður Jacobsen setti hol á fyri NSÍ, tá ið eitt korter var farið. Talan var um brotssparksmál. Dómarin peikaði á ellivu metra blettin, eftir at Dánial Hansen, sum myndaði álopið saman við Helga L. Petersen, var feldur.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki var tað Óli Hansen, sum var upp á spæl. Sum ikki eina ferð so var tað við høvdinum og eftir hornasparksinnlegg, at Óli skoraði. Miðskeiðis í 2. hálvleiki økti Helgi L. Petersen til 3–0, eftir at hann varð spældur púra leysur við málverjanum.

### B36 og brotsspøkrini

Í fjør eyðmýkti B36 fleiri ferðir klaksvíkingar. Bæði í steypakappingini og í landskappingini. Leygardagin var B36 í Klaksvík. Talan var ikki um nakað serligt fótbóltsligt undirhald. Umstøðurnar vóru ikki góðar. Tað var vindur og regn og kalt.

Klaksvíkingar kundu gleðast um, at tað hesa ferð eydnaðist at standa B36 mát. Men samstundis mugu teir í KÍ ásanna, at hundrandа árið higartil ikki hevur hilnast væl á heimavølli. Eftir at tað í síðstu løtu eydnaðist KÍ at fáa javnleik á heimavølli ímóti NSÍ, var uppskriftin næstan tann sama leygardagin ímóti B36. Tað restaðu fimm minuttir, tá ið Jan Andreasen við rimmar langskoti úr høgru og í handaru síðuna javnaði til 1–1.

Tá ið seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt, fekk B36 mál eftir brotsspark, sum varð dømt, tí dómarin metti, at John Petersen varð togaður niður. Bárður Mortansson skoraði, eftir at hann hevði roynt seg tríggjar ferðir. Í fjør misnýtti B36 fleiri brotsspørk, og leygardagin misnýttu teir fyri aðru ferð í ár. Jákup Mikkelsen bjargaði fyrst í stórum stíli, men dómarin segði, at B36 skuldi fáa nýggjan møguleika. Aftur royndi Bárður seg, og aftur bjargaði Jákup. Men hesa ferð bara hálvbjargaði hann. Bárður var fyrstur á returbóltinum, og so var mál. Stutt eftir steðgin var John Petersen tætt við at seta hol á, tá ið hann við høvdinum sendi í tvørtræið eftir horna.

KÍ eigur FS Vágar á heimavølli skírisdag. Á útivølli skulu teir ímóti NSÍ og B36 syrgja fyri, at teir fáa pláss í fjórðingsfinaluni. B36 og NSÍ skulu spæla í Gundadali skírisdag.

**Bólkur 1**
KÍ–B36 1–1 (0–0)
0–1: Bárður Mortansson
1–1: Jan Andreasen

FS Vágar–NSÍ 1–3 (0–2)
0–1: Sjúrður Jacobsen br.
0–2: Óli Hansen
0–3: Helgi L. Petersen
1–3: Birgir Joensen

## H71 hevur gallakvøldið

**Gallakvøldið í ár verður 17. apríl, og eru tað hesaferð hoyvíkingar, sum skipa fyri**

HONDBÓLTSGALLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tey bestu á árinum skulu aftur í ár finnast, og eftir at gallaveitslan hevur ferðast nakað seinnu árini, verða tað í ár hoyvíkingar, sum standa sum fyriskiparar. Tað gjørdu teir eisini tey bæði fyrstu árini, tá gallakvøldið varð hildið, og vóru teir í so máta undangongumenn í tí, sum hevur víst seg at gerast afturvendandi tiltak hjá fleiri ítróttargreinum.

Í ár er so tann broytingin, at allir leikarar í 1. og 2. deild hjá bæði kvinnum og monnum er boðin við, men tað verða so bara liðskiparar og venjarar í bestu deildini umframt fjølmiðlafólk, sum fara at greiða atkvøðu, tá bestu ítróttarfólkini á árinum skulu finnast.

Atkvøðast skal um ársins leikara, vejara, málverja, verjuleikara, álopsleikara, dómarapar og ársins stjørnuskot.

Eftir døgurðan verður sjálvandi eisini dansur á skránni, og gongst soleiðis, sum tað plagar, so er lítið at ivast í, at klokkan fer at verða hampuliga nógv, tá seinastu gestirnir takka fyri seg.

# Fýra fyri seg sjálvi

**Bæði FCK og OB eru við í tøttu DM kappingini, men tað tykist vera sera torført hjá føroyingunum at sleppa framat**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum varð tað rudduliga staðfest, at tað eru fýra feløg, sum hesar næstu vikurnar fara at kappast um danska meistaraskapin. OB, sum er fýra stig frá Esbjerg og fremsta plássinum, vann 3–1 á heimavølli ímóti AaB. Teir í Aalborg eru á fimta plássinum. OB hevur 47 stig, og AaB hevur 37 stig.

Leygardagin eydnaðist tað Brøndby at vinna. Teir áttu heimavøll ímóti Herfølge, og tað var eingin ivi um, at tað var heimaliðið, sum hevði størri styrkina og breiddina. Rudduligi sigurin var 3–0, og Herfølge venjarin ásannaði, at teir høvdu ongan møguleika havt at endurtaka bragdið, sum Herfølge onkra ferðina hevur staðið fyri á Brøndby stadion.

Brøndby hevði oddasessin til láns inntil sunnudagin, tá ið Esbjerg á heimavølli vísti, at tað avgjørt skal roknast við teimum. Gamaní kundi tað ikki roknast við, at gestirnir úr FC Nordsjælland skuldu gera tær stóru skreytirnar. Esbjerg vann 4–0, og harvið eru teir framvegis besta boðið upp á meistaraskapin.

FCK hevði torføra uppgávu í Århus. AGF hevði í trimum teimum fyrstu royndunum síðani vetrarsteðgin bara fingið eitt stig. Tað hevur verið roknað við, at fyrrverandi landsliðsspælararnir Stig Tøfting og Brian Steen Nielsen skuldu fáa skil á miðvøllin, og at svenski venjarin, Søren Åkerby, fór at megna at fáa annað skil á í Århus, har tað leingjast eftir, at teirra lið aftur skal verða millum tey bestu, men tað sær ikki væl út.

Undan FCK vitjanini segði svenski AGF venjarin, at Álvaro Santos, brasilski álopsspælarin, sum FCK í fjør keypti úr Svøríki, man vera besta útlendska keypið, sum nakað danskt felag nakrantíð hevur gjørt, og sviin vildi vera við, at higartil hevur Santos ikki víst seg frá síni bestu síðu.

Sunnudagin vann FCK 2–0 í Århus, og Álvaro Santos skoraði annað málið. Eftir tólv minuttir umsetti hann úr ellivu metrum. Í 2. hálvleiki staðfesti Morten Bisgaard FCK sigurin. Bisgaard var fyri fyrstu ferð á sentrala miðvøllinum, har hann spældi í plássinum, sum Thomas Røll annars hevur spælt síðani vetrarsteðgin. Morten Bisgaard varð í donsku fjølmiðlunum í gjár kosin at vera besti FCK spælarin í Århus.

### Tungt hjá føroyingunum

Todi Jónsson hevur seinastu vikurnar vant saman við teimum bestu hjá FCK. Men tað tykist torført hjá honum at sleppa upp í part aftur. Tað gongst væl hjá FCK, sum síðani vetrarsteðgin bara hevur mist stigini í Parkini ímóti Viborg næstsíðsta sunnudag. Zuma hevur ikki skorað í superliguni síðani eina ferð síðsta heyst, men hann tykist framvegis vera sjálvskrivaður á liðnum, og Peter Møller er fyrsti eykamaðurin.

Hjá OB er framvegis ikki pláss fyri Jákupi á Borg, sum OB hevur leigað frá HB inntil eina ferð í summar. Um tað ikki fer at hilnast betri hjá Jákupi, enn tað higartil hevur gjørt, so man tað vera lítið at ivast í, at Jákup fer at vera partur av HB liðnum eftir summarfrítíðina.

### Tungt hjá Frem

Í botninum eydnaðist tað AB at vinna. Teir høvdu vitjan av Frem, sum undan hesum umfarinum var næstniðast. Ebbe Skovdal, venjarin hjá Frem, helt eftir dystarenda, at hesir 90 minuttirnir mundu hava víst heimsmet í mistøkum. AB vann 1–0. Málið fingu teir, eftir at vanliga leiktíðin var farin. Málskjútti var Jesper Falck. Hóast sigurin er AB framvegis niðast, og eftir tapið sær tað heldur ikki væl út hjá Frem, sum er næstniðast og fimm stig frá triði niðasta plássinum, sum ber bjarging frá niðurflyting við sær.

Í Viborg endaði jyska uppgerðin millum Viborg og FCM 1–1. Hetta var fjórða ferðin á rað, at uppgerð millum hesi bæði liðini endaði við javnleiki.

# Andrew í miðdeplinum

**Meðan tað tykist vera torført hjá Hjalgrími og Jann Inga at vinna sær fast pláss, so styrkti Andrew av Fløtum sunnudagin um sína støðu í Fremad Amager**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Andrew av Fløtum tykist rættuliga hava funnið stevið í næstbestu donsku deildini. Tá ið Fremad Amager sunnudagin var á Eysturbrúgv og spældi ímóti B93, var Andrew av Fløtum tann einasti av føroyingurin, sum venjarin vísti álit frá fyrsta bríksli, og Andrew megnaði væl og virðiliga at gera tað, sum tað kann roknast við.

Tað eydnaðist ikki illa sperda Fremad at fáa meiri enn eitt stig burturúr. Úrslitið var 2–2, og hóast hann ikki skoraði, so átti Andrew av Fløtum sín stóra lut í báðum málunum. B93 legði seg á odda í 21. minutti, og í 46. minutti, tá ið Fremad spælararnir ikki høvdu funnið út av, at hvíldin var av, skoraðu teir til 2–1.

Í 28. minutti javnaði Fremad Amager. Málið fingu teir við beinleiðis frísparki, sum varð dømt, tí Andrew av Fløtum varð feldur. Í 55. minutti javnaði Fremad Amager til 2–2. Thomas Myssing stútaði málið, eftir at Andrew av Fløtum hevði sent innfyri.

Jann Ingi Petersen varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir. Tíggju minuttir seinni kom Hjalgrím Elttør á vøllin. Hann loysti Andrew av Fløtum av. Sambært heimasíðuni hjá Fremad Amager var Andrew skiftur út, tí hann orduliga var farin at møðast.

### Eingin í Vejle

Tað gongst illa hjá Vejle. Ian Højgaard var ikki í ferðalagnum í Haderslev, og tað var Christian Høgni Jacobsen heldur ikki. Hann er skaddur. Heimaliðið vann 1–0. Málið fingu teir, tá ið tað restaði eitt korter.

Vejle og Fremad Amager hava bæði fimtan stig og eru dygst omanfyri niðurflytingar strikuna. Sønderjyske, sum heimaliðið í Haderslev nú verður nevnt, hevur við góðum úrslitum í vár, fingið um endan í oddastríðnum, har teir eru á fjórða plássinum, fýra stig frá næstovasta plássinum.

Horsens er framvegis fremst. Men nú er stígur komin í hjá teimum. Johan B. Hansen og liðfelagarnir høvdu vitjan av samansetta liðnum á Lollandi og Falster. NFA vann 1–0. Hetta var annað tapið á rað hjá Horsens.



# Meistarar



*Gullið var langt síðani fingið til høldar, so tær hjá Stjørnuni høvdu havt stundir at fyrireika eina rætta gullveitslu*
*Mynd: Bárður Lydersen*



*Kontrastirnir eru sjónligir. Ein fullkomuliga ólukkuligur VÍF-leikari. Í bakgrundini sæst ein heilur hópur av fagnandi Kyndils-fólki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 204 | (41) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 177 | (45) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 170 | (38) |
| Ioana Rápa | VÍF | 155 | (36) |
| Daiva Tuomaite | VB | 154 | (20) |
| Gurið Mortensen | VB | 145 | (8) |
| Melica Ergic | StÍF | 130 | (18) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 125 | (26) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 120 | (20) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 117 | (50) |
| Irina Radovici | VÍF | 106 | |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 105 | (12) |
| Lina Andriulyte | Neistin | 104 | |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 104 | |
| Poula D. Olsen | StÍF | 95 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Damir Oros | KÍF | 137 | (46) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 131 | (4) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 127 | (10) |
| Blagoje Buha | Neistin | 122 | (25) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 114 | (38) |
| Ingi Olsen | VÍF | 111 | (29) |
| Áki Mørk | Neistin | 106 | (20) |
| Henrik Gerster | H71 | 106 | (32) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 97 | (30) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 95 | |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 95 | |
| Gert Hansen | KÍF | 87 | (3) |
| Agnar Joensen | VÍF | 87 | (10) |
| Regin Petersen | KÍF | 86 | (1) |
| Sámal Joensen | VÍF | 85 | (11) |




*Føroyameistarar í kvinnuhondbólti 2003/2004. Stjørnan*



*Føroyameistarar í manshondbólti 2003/2004. Kyndil*

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 12 | 11 - 0 - 1 | 654 | 481 | 173 | 33 |
| 2 | VB | 12 | 11 - 0 - 1 | 694 | 512 | 182 | 30 |
| 3 | VÍF | 12 | 8 - 0 - 4 | 642 | 520 | 122 | 25 |
| 4 | Neistin | 12 | 6 - 0 - 6 | 617 | 559 | 58 | 20 |
| 5 | StÍF | 12 | 2 - 0 - 10 | 551 | 678 | -127 | 9 |
| 6 | Søljan | 12 | 3 - 0 - 9 | 466 | 601 | -135 | 8 |
| 7 | Kyndil | 12 | 1 - 0 - 11 | 388 | 661 | -273 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 10 | 5 - 2 - 3 | 593 | 556 | 37 | 21 |
| 2 | Neistin | 10 | 7 - 0 - 3 | 580 | 529 | 51 | 20 |
| 3 | VÍF | 10 | 6 - 1 - 3 | 570 | 512 | 58 | 19 |
| 4 | StÍF | 10 | 4 - 0 - 6 | 523 | 511 | 12 | 15 |
| 5 | H71 | 10 | 3 - 1 - 6 | 510 | 588 | -78 | 9 |
| 6 | KÍF | 10 | 3 - 0 - 7 | 551 | 631 | -80 | 9 |